# Fáar broytingar

**Landsliðið skuldi hava sínar fyrstu venjingar á Sveisferðini hósdagin, men roknað verður ikki við teimum heilt stóru broytingunum í mun til Malta-dystin**

LANDSLIÐIÐ
*Jákup Mørk/ Álvur Haraldsen*



*Donsku útisetarnir komu longu til Sveis mikumorgunin, og um kvøldið kom so restin av leikarahópinum*

**Basel, Sveis:** Íslendsku útisetarnir komu longu týskvøldið til Føroya, og saman við leikarunum í heimligu kappingini sessaðust teir mikudagin í flogfarinum hjá Atlantic Airways, sum so fleyg føroyska hópin beinleiðis til Basel, har dysturin verður leiktur leygardagin.

Donsku útisetarnir, Hjalgrím Elttør, Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum og Jón Rói Jacobsen komu saman við Claus Bech Jørgensen til Sveis longu mikumorgunin.

Hósdagin um døgurðaleitið skuldi hópurin hava fyrstu venjingarnar, og verður hetta á Rahnhoff Stadion, sum liggur miðskeiðis í býnum. Ikki fyrr enn fríggjakvøldið sleppa leikararnir at royna á vøllin á sjálvum leikvøllinum, har dysturin fer fram, men soleiðis siga altjóða ásetingarnar, at tað eigur at vera.

Og sum støðan er í løtuni, so er einki, sum bendir á, at føroyski hópurin ikki verður fullmannaður. Eingin av leikarunum hevur nakran álvarsligan skaða at dragast við, og treytað av, at venjingarnar ikki ganga so hart fyri seg, at menn gerast skaddir, so kann Henrik Larsen seta liðið saman, júst soleiðis sum hann vil hava tað.

Tað vil helst eisini siga, at talan ikki verður um tær stóru broytingarnar í mun til Malta-dystin. Eitt ivamál er kanska, hvørt Jákup Mikkelsen aftur skal vinna sær pláss í málinum, ella um venjarin heldur fast við Jens Martin Knudsen í hesum sessinum, og so er spurningurin, hvør fer at manna føroyska álopið.

Her var John Petersen seinast, og tað er lítið at ivast í, at venjarin velur at halda fast um hetta. Og so er spurningurin, hvør skal verða makkari hjá skálamanninum. Her var Hjalgrím Elttør valdur seinast, men avrik hansara var ikki heilt sannførandi, og tí kann roknast við, at Claus Bech Jørgensen kemur beinleiðis inn á álopsplássið. Vanliga spælir hann annars á øðrum kantinum í eini 4-4-2 skipan, men tað kann neyvan roknast við, at venjarin fer at ofra Jákup á Borg ella Rógva Jacobsen, sum báðir hava átt plássini í borðunum seinastu tíðina.

## Barthez ikki við í Føroyum

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Avboðini eru mong í tali, nú franska landsliðið kemur til Føroya at spæla. Seinasti leikarin, sum hevur givið avboð, er málverjin Fabien Barthez úr felagnum Marseille. Hann fekk ein skaða í fótin undir venjing mánadagin og verður tí ikki førur fyri at verja málið á landsliðnum í dystunum ímóti Ísrael og Føroyum.

Fyri Barthez er Mickael Landreau úr Nantes innkallaður, men tað verður væntandi Lyon málverjin Gregory Coupet, sum fer at verja málið ímóti Ísrael. Áður hava David Trezeguet úr Juventus og Alou Diarra eisini tikið seg aftur vegna skaða, og fyri teir eru úttiknir ávikavist Louis Saha úr Manchester United og Vikash Dhorasoo úr AC Milan.

## Frem framvegis við

Fyrsti dysturin í triðja umfarinum í donsku steypakappingini, DONG CUP, varð spældur í fyrrakvøldið. Frem, sum er felagið hjá Jón Róa Jacobsen og Gunnari Nielsen, spældi á útivølli ímóti Brønshøj. Úrslitið var 4-2 til Frem, sum harvið er fyrsta felagið, ið er komið í fjórða umfarið í kappingini. Hinir dystirnir í triðja umfarinum verða spældir mitt í næstu viku.

Jón Rói Jacobsen var ikki á Frem liðnum. Mikumorgunin fór hann saman við hinum fótbóltsútisetunum í Danmark til Sveis, har landsliðið skal spæla leygarkvøldið.

Fjórða umfar verður spælt mikudagin 29. september.

**jh**

# Føroyingar uppsteðgaðir

**Skjótt kann tað venda í talvi. Martin Poulsen, sum aftaná fýra umfør lá fremstur í 3rd Klaksvík International, er nú aftastur saman við hinum báðum føroyingunum. Tað merkir somuleiðis, at vit ongan føroyskan IM-norm fáa á hesum sinni**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Hóast Heini Olsen, Martin Poulsen og Ólavur Simonsen ikki hava hildið fast í góða stimanum seinastu trý umførini, hava teir sanniliga verið við at mynda kappingina við frískari telving. Eisini hevur trio´in tikið mangt stigið frá oddamonnunum.

Sjey umfør eru leikt og trý resta í. Støðan er hendan:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | IM Jens O. F. Nielsen | 4,5 |
| 2. | IM Emil Hermansson | 4,0 |
| 3. | IM Sævar Bjarnason | 3,5 |
| 4-6. | Heini Olsen | 3,0 |
| 4-6. | Ólavur Simonsen | 3,0 |
| 4-6. | Martin Poulsen | 3,0 |

Okkara menn dvøljast í løtuni í botninum, men kappingin er jøvn og tað tykist sum hvørt talvið er púra opið. Serliga fimta og sætta umfar kostaðu føroyingunum nógv stig. Einans eitt stig av seks møguligum. Hetta eina stigið vann Ólavur í spennandi talvi móti Hermansson.

Í sjeynda umfari ognaði Heini Olsen sær eitt kærkomið stig, tá hann heldur lættliga vann á Ólavi. Heini lá framanundan einsa-mallur aftastur. Martin offraði heilar tveir menn og afturfyri fekk hann ævigt skák og harvið javnleik móti Hermansson í somuleiðis sjeynda umfari.

Felags fyri allar er, at teir hava telvað nakað óstøðugt og kanska eitt sindur undir vanligt støði. Tó hevur Ólavur - um vit meta út frá hansara ratingtali, sum er lægst í kappingini - telvað eitt vet yvir væntaðu skoruna. Kenna vit hann rætt, er hann tó neyvan nøgdur við úrtøkuna higartil.

### Ongan norm

Kravið at vinna sær ein IM-norm var 6,5 stig. Tá heimamennirnir nú hava trý stig aftaná sjey umfør, er hetta mál tíverri ógjørligt. Spell, men vit eiga at hugsa um, at serliga sviin Hermansson og danin Fries Nielsen eru tveir royndir og sterkir altjóða meistarar. Sævar er vanliga sera svingandi, men í Klaksvík tykist hann at telva væl í løtuni. Íslendarin hevur nevnliga vunnið sær hálvttriðja stig seinastu trý talvini.

Ikki nyttar tað stóra at gráta yvir spilta mjólk. Fegnast kunnu vit um, at umstøðurnar at telva í Klaksvík eru enn einaferð á høgum altjóða støði. Úr Klaksvík verður eisini frætt, at telvararnir hugna sær óført saman. Millum annað eta teir hvønn dag saman og hóast kríggið á 64 puntunum gongur hart fyri seg, ber væl til at samansjóðast millum talvini.

Í gjár, hósdagin, hittust Ólavur og Martin. Heini hevði svarta fólkið móti Sævari. Fylgið við á frálíku heimasíðuni hjá Klaksvíkar Talvfelag: www.ktfchess.com. Har ber til at lesa frásagnir frá kappingini, eins og talvini hvønn dag verða víst beinleiðis á telduskíggjanum.



# Spurningar og svør

**Niðanfyri prentað vit teir 30 spurningarnar, sum svarast skuldu í kappingini saman við tilhoyrandi svørunum**

**1-leikvøllir**
Bæði Manchester og Liverpool finna vit nakrar av kendastu leikvøllunum í heiminum. Men:

1) Hvussu eitur heimavøllurin hjá Manchester United?
Old Trafford
2) Hvussu eitur heimavøllurin hjá Liverpool?
Anfield Road
3)Hvussu eitur parturin av heimavøllinum hjá Liverpool, har mest trúføstu áskoðararnir vanliga standa?
The Kop

**2-skotar**
Skotar hava átt sín stóra lut í góðu úrslitunum hjá Manchester United og Liverpool. Í dag skulu vit hava nøvnini á trimum teirra:

1) Hvør var skotin, sum í seksti-árunum reisti Liverpool FC, og fram um aðrar legði lunnar undir stórtíðina?
Bill Shankley
2) Ein annar skoti var eisini tann, sum í fimti- og seksti árunum gjørdi Manchester til kanska kendasta felagið í heiminum. Hvør var hesin venjarin, sum eftir vanlukkuna í 1958 mátti byggja eitt mest sum nýtt lið upp?
Matt Busby
3) Verandi venjarin hjá Manchester United er ein av teimum mest vinnandi nakrantíð í enskum fótbólti. Eisini hann er skoti, men hvat er navnið?
Alex Ferguson

**3-venjarar**
Hesaferð snúgva spurningarnir seg um venjarar, sum hava ella hava havt sína gongd í teimum báðum stórfeløgunum.
1) Ein fyrrverandi tekniskur stjóri hjá franska landsliðnum fekk í summar sekkin í Liverpool. Hvussu eitur fraklendingurin?
Gerard Houllier
2) Fyri fyrstu ferð nakran tíð hevur Liverpool í ár ein spanskan venjara: Hvør er hesin?
Rafael Benitez
3) Ein væl lýddur portugisiskur venjari er í aftur hjálparvenjari hjá Manchester United, eftir at hann í fjør stóð á odda fyri sjálvum Real Madrid. Hvør er hesin?
Carlos Quiroz

**4-7'arar í Manchester**
Troyggjan við 7-talinum hjá Manchester United verður í dag borin av unga Christiano Ronaldo. Og hann er væl vitandi um trýstið, sum fylgir við hesari, tí júst 7-talið plagar í Manchester at fylgja teimum stóru stjørnunum.

1) Hvør er fraklendingurin, sum í 1992 kom til Manchester United, og sum har gjørdist heilt stóra hetjan á liðnum, sum førdi felagið inn í eina nýggja gulløld?
Eric Cantona
2) Í síni tíð varð hann dýrasti leikarin í bretskum fótbólti, og í fleiri ár var hann liðskapari fyri bæði Manchester United og Ongland. Hvør er miðvallarstríðsmaðurin, sum í 1981 kom til Manchester United úr West Bromwich Albion í 1980.
Bryan Robson
3) Kanska størsta fótbóltsidolið í heiminum í dag, hevur eisini borið reyðu troyggjuna við 7-talinum. Hvør er leikarin, sum í dag hevur nummar 23 í Real Madrid?
David Beckham

**5-danir**
Danir hava í nógv ár verið partur av stríðnum millum Manchester og Liverpool. Hesaferð skulu nøvnini á trimum teirra finnast

1) Hvat er navnið á danska málverjanum hjá Manchester United, sum í 90'unum varð mettur sum ein av heimsins bestu málverjum?
Peter Schmeichel
2) Ein fyrrverandi miðvallarkempa hjá Liverpool var fyri tveimum árum síðani venjari hjá Julian Johnsson í Hull. Hvussu æt stóri danin?
Jan Mølby
3) Fyrsti danin í Manchester United var ein lítil vinstrabeintur driblari, sum varð keyptur stutt eftir, at hann í 1981 hevði javnað til 2-2, tá Danmark leikti móti Onglandi í HM-undankappingini. Hvør var hesin?
Jesper Olsen

**6-Málskjúttar í Liverpool**
Liverpool hevur í mong, mong ár átt nakrar av vandamestu álopsleikarunum í enskum fótbólti, og í dag skulu vit hava nøvnini á trimum teirra.

1) Við ikki færri enn 346 málum fyri besta liðið, er hesin walisin tann mest skorandi nakrantíð fyri Liverpool. Hvør er maðurin, sum eisini hevur roynt at skora móti Føroyum?
Ian Rush
2) Størsta álopsstjørnan hjá Liverpool seinnu árini er eisini yngsti málskjúttin í søguni hjá felagnum. Hvør er leiakrin, sum um viku-skiftið skrivaði undir sáttmála við sáttmála við Real Madrid, har hann fer at hava nummar 11 á bakinum?
Michael Owen
3) Ein av størstu hetjunum í Liverpool nakrantíð, var hesin skotski álopsleikarin. Umframt at vera leikari, var hann í 1985-91 venjari í felagnum. Hvør er leikarin, sum í 511 dystum skeyt 172 mál fyri Liverpool?
Kenny Dalglish

**7-Verjukempur**
Ofta eru tað málskjúttarnir, sum eru stóru hetjurnar, men verjuleikararnir hava ofta ein minst líka týdningarmiklan leiklut. Hesa ferð eru tað tríggir av teimum heilst stóru verjukempunum, sum vit vilja hava nøvnini á.

1) Hóast hann ofta varð útskeldaður, er hesin leikarin helst ein av stinnastu verjuleikarunum í søguni hjá Liverpool. Í alt gjørdist talan um 648 dystir í Liverpool og 50 landsdystir fyri Ongland. Hvør var leikarin, sum varð eyknevndur »concorde«, og sum eisini slapp at royna seg sum hjálparvenjari hjá enska landsliðnum.
Phil Neal
(Her skylda vit lesarunum – og serliga Liverpool-fjepparum – eina umbering. Dystartalið og tað at verða útskeldaður, svarar til Phil Neal, men »the Concorde« á Liverpool liðnum var Phil Thompson. Vit biðja lesararnar halda okkum til góðar)
2) Á Manchester United liðnum var hesin stóri bretin ein sannur risi í verjuni seinna partin av 80'unum og fyrrapartin av 90'unum. Hvør var bretski landsliðsleikarin, sum saman við Steve Bruce var álitið í verjuni framman fyri Peter Schmeichel.
Gary Pallister
3) Á verandi liðnum hjá Liverpool er ein av hornasteinunum liðskiparin á finska landsliðnum. Hvussu eitur hesin sterki verjuspælarin, sum fá kendu, tá hann fyri trimum árum síðani kom til Liverpool?
Sami Hyypia

**8-driblingar á kantinum**
Teir eru leikararnir, sum fólkið elskar at síggja. Klassisku bretsku vongspælararnir, sum við driblingum og fintum lyfta fótbóltin upp á listarligt støði. Tríggjar av teimum skulu vit finna fram til í dag.

1) Norðurírski driblikongurin, sum av mongum verður mettur sum størsta talentið í alheims fótbóltssøguni. Tíverri fyri fótbóltin dugdi hann sær ikki nóg væl hógv uttan fyri fótbóltsvøllin, og seinastu mongu árini hevur tað mest verið fyri rúsdrekkatrupulleikar sínar, at hann hevur prýtt forsíðurnar.
George Best
2) Hóast hann ofta leikti mitt fyri, so megnaði hesin myrki vongspælarin sum fáur at senda mótstøðumenn til viks, tá farast skuldi fram eftir vøllinum. Sparkiteknikkurin var framúr, og ofta sendi hann eisini fríspørk beinleiðis í kassan. Hvør er leikarin, sum kom til Liverpool úr Watford, og sum seinni royndi seg sum leikari í Newcastle saman við t.d. Ian Rush?
John Barnes
3) Á Manchester-liðnum í dag er tað hesin leikarin, sum hevur dystarmetið. Hóast hann framvegis bara er 30 ára gamal, hevur hann í eini 12-13 ár verið roknaður sum ein av bestu vongspælarunum í Stórabretlandi. Bert spell, at tað ikki hevur eydnast honum og walisisku landsmonnunum at spæla seg fram til nakað endaspæl fyri landslið.
Ryan Giggs

**9-Sigrar**
Manchester United og Liverpool eru mest vinnandi feløgini í enskum fótbólti

1) Liverpool er felagið, sum oftast hevur verið enskur meistari. Men hvussu ofta?
18 ferðir
2) Manchester United er hinvegin felagið við flestu FA-Cup sigrunum. Hvussu ofta hevur Manchester United vunnið ensku steypakappingina?
11 ferðir
3) Og eisini í Europa-Cup fyri meistaralið hava bæði feløgini gjørt um seg. Her hevur Liverpool verið eitt sindur drúgvari, men hvussu ofta er stóra europeiska steypið endað á Anfield Road?
4 ferðir

10-vanlukkur
Umframt glæsisligu sigrarnar, so hava bæði Manchester United og Liverpool havt sínar vanlukkur.

1) Á hvørjum leikvølli var vanlukkan, sum kravdi 89 mannalív, tá Liverpool og Nottingham Forest leiktu hálvfinalu í ensku steypakappingini?
Hillsborough
2) Nærum eitt heilt lið av framúr evnaríkum leikarum lat lív, tá flogfarið við Manchester United liðnum skuldi fara á flog í München. Men hvat ár hendi hetta?
1958
3) Ein dystur millum Liverpool og Juventus var í 1985 bein-leiðis atvoldin til, at ensk feløg fingu drúgt bann frá europeiskum fótbólti. Men á hvørjum leikvølli fór Europa-Cup finalan fram tað árið?
1985

# Vinnarin funnin



**Vinnarin av stóru kappingini, sum Sosialurin skipaði fyri í samstarvi við MB Tours og Atlantic Airways er nú funnin**

KAPPING
*Stefan í Skorini*

Sera stórur áhugi hevur verið fyri kappingini, og Sosialurin hevur fingið brøv frá nógvum vónríkum føroyingum, ið droymdu um eina ferð, har høvi var at síggja enskan fótbólt live á leikvøllinum.

Vinnarin gjørdist Heini Mikal Mortensen av Tvøroyri. Heini varð trektur úr rúgvuni, og hann hevði eisini svarað øllum tríati spurningunum rætt. Tí var tað Heini, ið fekk høvi at fara til Old Trafford at hyggja eftir Manchester United og Liverpool. Heini hevur tó valt at fara til onkran annan Premier League dyst við MB Tours seinni í ár.

### Ferðin avlýst

Ferðin til dystin millum Manchester United og Liverpool tann 20. september er avlýst vegna vantandi undirtøkur. Trupulleikin er, at dysturin verður leiktur mánadag, og tí liggur ikki so væl fyri hjá fólki at fara.

MB Tours ætlar tó at skipa fyri ferðum til aðrar Premier League dystir í hesum kappingarárinum. Hesir dystirnir skulu tó liggja antin leygardag ella sunnudag, so at tað verður høgligari hjá fólki at vera við.

MB Tours skipar annars fyri nógvum fótbóltsferðum á hvørjum ári. Fleiri enn 100 fólk fara til Kypros við landsliðnum, og MB Tours hevur nú fylt eitt flogfar, sum fer til landsdystin í Írlandi í oktober. Tað hoyrir tó við til søguna, at tilsamans fýra leiguflogfør fara úr Vágunum til tann dystin. MB Tours skipar eisini á hvørjum ári fyri ferðum til dystir ímillum FCK og Brøndby.




NORÐURLANDAHÚSIÐ TILTØK SEPTEMBER 2004

SKRÁIN VIKA 33-34

Framsýningin "Burðardygg norðurlendsk byggilist" letur upp
3. september og er í Húsinum til 12. september.

Fríggjadagur 3. september
Kl. 17.00 Framsýningin "Burðardygg norðurlendsk byggilist" letur upp

Kl. 21.00 Fólkatónleikur í Atlantis í Klaksvík.
2 trubadurar Johan Piribauer úr Laplandi og Per Warming úr Danmark.

Sunnudagur 5. september
Kl. 16.00 ÆLABOGIN konsertvitjan úr Noregi.
Orkestrini Austjord Musikkorps og Haug Misikkorps, felagskonsert í Klingruni.

Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00
og sunnudagar kl. 14.00-18.00

NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790
www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo